## DAGSINS MEINING

# Lítið "upp á hjarta"

Eitt ber til at staðfesta eftir valframløguna mikudagin: Sambandaflokkurin hevur ikki tær stóru hugsjónirnar - visjónirnar - nú undan valinum. Hann setir sær ikki ítøkilig mál at fremja. Uttan at byggja út landssjúkrahúsið, hvat tó er eitt gott mál. Hugsjónir! Tær eru kanska ikki neyðugur, halda oddafólkini í Sambandsflokkinum. Føroyingar vita jú, hvat Sambandið stendur fyri.

Tað var annars við spenningi, at bíðað varð eftir valskránni hjá Sambandsflokkinum. Flokkurin hevur sitið í andstøðu í fýra ár, og summir av framherjunum í flokkinum, hava verið rættiliga markantir. Fyrispurningarnir hava verið nógvir, og uppskotini hava verið rættiliga mong. Men løgið nokk, hetta sæst ikki so væl aftur í valskránni.

Floksformaðurin sigur í einum viðtali, at flokkurin vil ikki lova ov nógv. Hann vil kanna fíggjarligu støðuna, og síðani síggja, hvat er møguligt og ikki. Gamaní. Men veljararnir vilja gjarna hava at vita, hvat flokkarnir vilja og hvørji boð, flokkarnir hava upp á at loysa mongu av trupulleikunum í samfelagnum. Men her vóru eingi boð.

Somuleiðis vilja veljararnir eisini hava at vita, hvussu ætlaninar skulu fíggjast. Nakað kann kanska fíggjast innan fyri karmin í fíggjarlógini. Men tað veldst alt um, hvussu árið í ár fer at vignast. Verður aftur í ár stórt avlop á fíggjarlógini, so er møguleiki at útbyggja á fleiri økjum uttan at hækka skatta- ella avgjaldstrýstið.

Javnaðarflokkrin hevur t.d. mælt til ikki at økja skattin, men hevur hinvegin mælt til, at okkurt arbeiðsmarknaðargjald verður hækkað at fíggja øktar pensjónir við. Hvat heldur Sambandsflokkurin t.d. um tað, nú flokkurin bara hevur boð um samstarv við Javnaðarflokkin.

Hesir flokkarnir hava tað til felags, at teir vilja vera verandi innan karmin í ríkisfelagsskapinum, hóast Javnaðarflokkurin er sinnaður fyri øktum sjálvstýri og einum sjálvberandi búskapi sum frálíður. Sjálvt um Sambandsflokkurin hevur tosað um eitt nýskipanaruppskot, so er tað líkasum kódnað í berum "sambandi". Tað er líkasum at Sambandsflokkurin bæði vil leggja avstand til Javnaðarflokkin og samtíðis nærkast honum. Øðrumegin vil man vera einasti mótpolurin til Tjóðveldið, og tá vil man vera tað gamla sambandið, meðan man hinumegin - fyri at kvetta brýr og fyri at kunna sleppa í samgongu við Javnaðarflokkin roynir at leggja seg nærri at hansara ríkisfelagspolitikki.

Vil Sambandsflokkurin bara status quo, er spurningurin, um grundarlag er fyri samstarvi millum teir báðar flokkarnar eftir løgtingvalið um 25 dagar, tí Javnaðarflokkurin, sum slóðaði fyri øllum politiskum orðaskifti um økt sjálvstýri nú eftir kreppuna, má eisini slóða fyri eini víðgongdari skipan, sum tað hóast alt skuldi verið meiriluti fyri í føroyska fólkinum.

Sambandsflokkurin hevur fingið góða undirtøku í seinastu veljarakanningunum. Líkt er til, at fólk heldur velja samband enn greiðar og ítøkiligar ætlanir fyri at útbyggja vælferðarsamfelagið Føroyar. Ella, sum onkur segði, Sambandsflokkurin hevur ikki nógv "upp á hjarta". Fyri Javnaðarflokkin er avgerandi at fáa fólk at skilja, at hvørki samband ella fullveldi er nøkur gongd leið. Tørvur er á eini stigmenning - eini hóvligari men miðvísari leið fram móti størri sjálvbjargni og sjálvsræði.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Viðmerking til grein hjá Súna í Hjøllum

**Jan Danielsen**
*Bygdaráðslimur í Nes kommunu (og ikki uppstillaður til løgtingsvalið)*



Ja, tað ræður um at tekkjast veljarunum, nú tað stundar til løgtingsval.

Í Sosialinum hin 26. mars hevur Súni í Hjøllum, formaður í teknisku nevnd hjá Nes kommunu grein um at Nes kommuna er í stórari menning og at ætlanir eru um at gera fleiri íløgur í havnalagið.

Súni vísir í grein síni á nógv av tí, sum er hent á havnalagnum seinastu árini, og á ætlanir, sum kommunan hevur í framtíðini. Alt hetta er sjálvandi at frøðast um. Eisini sigur Súni, at Nes kommuna hevur stívliga 3 milliónir krónur at arbeiða við á havnalagnum í ár. Rætt er tað.

Men á almenna bygdaráðsfundinum hin 11. mars í ár, mæltu vit í fíggjarnevndini bygdaráðnum til at flyta óbrúkta íløgu frá 2001 uppá kr. 1.180.000 til at brúka á havnalagnum í ár. Hesum atkvøddi øll tekniska nevnd við Súna í Hjøllum á odda ímóti. Tilmælið bleiv tó samtykt, men ikki við stuðli úr teknisku nevnd.

Fíggjarnevndin mælti eisini til at vekta íløgur á havnalagnum í ár við 50%, soleiðis sum avtala er gjørd um millum Føroya Landsstýrið og Kommunufeløgini. Á henda hátt kundu vit koma uppá eina samlaða íløgu á havnalagnum uppá stívliga 3 milliónir krónur. Eisini hesum tilmæli atkvøddi Súni í Hjøllum ímóti. Hetta tilmælið bleiv tó eisini samtykt. Um áhugi er fyri tí, ber til at fara inn á kommunuskrivstovuna at lesa úr gerðabókini frá fundinum.

Jú, rætt er at Nes kommuna hevur stívliga 3 milliónir krónur tøkar til íløgur á havnalagnum í ár, men tað er altso ikki við stuðli frá Súna í Hjøllum at upphæddin er komin so langt upp, tí avsettar vóru upprunaliga bert 400.000 krónur.

# Lærarafelag Handilsskúlans átalar embætisførslu fíggjarmálaráðharrans

**Vegna Lærarafelag Handilsskúlans**
**Fritleif Henriksen**

Samráðingarnar millum Lærarafelag Handilsskúlans og fíggjarmálastýrið um ein føroyskan sáttmála eru slitnaðar.

Einki løgið er í tí, at samráðingar slitna – tað hevur veirð reglan ehldur enn undantakið hesi seinastu árini.

Kortini er tað eitt mál, sum er sera løgið. Málið gongur aftur til 1988, tá ið blokkstuðulin kemur. Millum 1988 og 1992 setir mentamálastýrið 13 lærarar í starv á Handilsskúlanum. Í setanarskrivinum gevur mentamálastýrið teimum rætt til eftirløn, sum arbeiðsgevarin hevur skyldu at syrgja fyri.

Í 1998 váttar samráðingarleiðarin hjá fíggjarmálastýrinum munnliga, at hesa skyldu hevur arbeiðsgevarin forsømt, at fíggjarmálastýrið hevur skyldu til at veita hesum lærarum tilsagnarpensión, og at hetta var eitt mál fyri fíggjarmálastýrið at avgreiða. Hetta kundi gerast við eini løgtingslóg.

Tá ið Læararfelag Handilsskúlans biður um eina skrivliga váttan, er svarið nei.

Í 1999 hálsar fíggjarmálastýrið um og krevur, at Lærarafelag Handilsskúlans skal gera ein sáttmála við fíggjarmálastýrið fyrst, áðrenn teir 13 lærararnir kunnu fáa nakra eftirløn.

Hvat mistak hava hesir 13 samfelagsborgarar gjørt? Teir søktu starv á Føroya Handilsskúla í tíðarskeiðnum 1988 – 1992. Teir fingu síni setanarskriv og hava trúliga og ábyrgdarfult røkt sínar skyldur hesi árini í teirri føstu trúgv, at arbeiðsgevarin eisini helt sínar skyldur.

Hví tekur so fíggjarmálaráðharrin hesar 13 borgarar sum gíslar?

Jú! Fyri 2 árum síðani gjørdi fíggjarmálastýrið ein sáttmála við Yrkisfelagið og Felagið fyri Sjómansskúlalærarar og Maskinskúlalærarar. Í hesum sáttmálum góvu hesi feløgini tilsøgn um at arbeiða við nýggjum arbeiðstíðarreglum, og miðað varð ímóti at seta tær í verk í august 2002.

Nú semja ikki fæst í lag um hesar nýggju arbeiðstíðarreglur, so skal Lærarafelag Handilsskúlans brúkast sum jarnbrot, og tað hava smaráðingarfólkini hjá fíggjarmálastýrinum heldur ikki dult fyri.

Tí er Lærarafelag Handilsskúlans møtt við ultimativum krøvum um høvuðsavtalu, nýggjar arbeiðstíðarreglur og ongum – ella lægri lønarhækkingum enn hini feløgini á arbeiðsmarknaðinum.

Lærarfelag Handilsskúlan hevur heldur ikki frá umboð mentamálastýrisins í samráðnevnd fíggjarmálastýrisins fingið aðrar ábendingar enn, at mentamálastýrið tekur undir við hesum ódámliga framferðarhátti fíggjarmálastýrisins.

Vit kunnu staðfesta, at 13 fullkomiliga ósek fólk skulu bøta fyri hetta, og tað er sera álvarsamt.

Hetta eru ófrættakend boð at fáa frá landsins myndugleikum, sum áttu at havt rættvísi og virðing fyri landsins borgarum í sínum skjaldramerki.

Lærarafelag Handilsskúlans metir hetta sum valdsmisnýtslu, og embætisførsla fíggjarmálaráðharrans eigur at verða kannað og eigur eisini at fáa avleiðingar, um niðurstøðan er tann sama, sum Lærarafelag Handilsskúlans er komin til.


**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VALGREINAR

# Javnaðarflokkurin vil menna øll øki í Føroyum!

**Birgir Mohr**
*Valevni Javnaðarfloksins á Sandi*



Arbeiðið til allar hendur – tað er treytin fyri trivnaði! Tá tosa verður um økispolitik ella útoyggjapolitik, so er høvuðsfyritreytin fyri trivnaði, at lønt arbeiði er til allar vinnuførar hendur. Nakrir gyllin í jørð føða ongan, men er ein góð hjálp til húsarhaldið, um ein hevur tíð, umstøður og hug til at arbeiða jørðina. Av sær sjálvum gevur jørðin líti og einki.

Hettar upplivdu vit, ikki minst, her í Sandoynni undir kreppuni. Fyrst tá vit fyngu Sandoyar-ætlanina setta í verk, og virkisfólk fóru undir at opna flakavirkini aftur, tá kom lív í av nýggjum – tá fingu tey flestu lønandi arbeiði aftur. Tá kom trivnaður aftur millum fólk.

Tað er tí sera umráðandi, at fiskavirkini á Sandi og í Skopun koma at halda áfram, og fáa bestu umstøður at virka undir. Talan er um arbeiðspláss til meira enn 100 fólk, og møguleikar fyri bátar og skip í Sandoyar-økinum at landa her á heimplássinum.

Hesi arbeiðspláss hava, saman við skipum og bátum, økt munandi um skattainntøkurnar hjá kommununum her, og tíðningurin av hesum arbeiðsplássum kann ikki metast nóg høgt.

Hetta skapti Sandoyarætlanin hjá Føroya Løgtingi. Hesar almennu 3 mill. kr. hava fyri føroyska samfelagið forrenta seg aftur nógvar ferðir, og eru enn eitt dømi um, at almen hjálp – tá privata fyritakssemi ikki røkkur - eisini til vinnuligt endamál kann vera sera skilagóð hjálp.

Í Skálavík er komið eitt fiskavirki. Eitt líti virki til eina lítla bygd, sum kundi – kemur tað at fáa viðvind – givið arbeiðið til øll tey fólk, sum ídag ikki eru bundin at øðrum vinnum, ikki minst til konufólkini har búgva.

Sum skilst í bløðunum, so hevur byrjanin verið tung, sum ikki einaferð – "Aller anfang ist svehr". Men virkið eigur at fáa hjálp, so ella so, tí arbeiðsplássini á hesum virki kunnu koma Skálavík og skálvíkingum sera væl við í framtíðini.

Eisini eigur at verða útvega hjálp til Skálavíkar havn, so bátahylurin kann verjast, nú grótkastið hevur verið fyri ágangi av tíðarinnar tonn, veðri og vindi.

Tey trí nevndu fiskavirkini vera høvuðs-arbeiðspláss okkara í Sandoyarøkinum í framtíðini, og eiga tey tí at fáa bestu karmar at virka undir.

Sitandi samgonga hevur arbeitt við uppskotum til nýggjar jarðarlógir. Sind at siga, hesi hava verið nakað at reypa av, og er tí heldur eingin semja fyngin um at fremja hesu uppskot til lóg.

Tó eitt er neyðugt fyri landbúnaðarvinnuna – og her verður serliga hugsa um festigarðarnar, sum vera riknir vinnuliga – tað er, at ein saneringsskipan verður fingin til vega fyri teir fíggjarligu niðurundir komu garðarnar. Eisini er neyðugt, at nútímansgerða reglurnar fyri festibøndurnar, í samband við eftirlønarviðurskiftið, bústaðarviðurskiftið og ognarviðurskiftið, til amboð og bygningar.

Men at "selja" ella "forera" nøkrum almennu jørðina, tað loysir als ikki trupulleikarnar fyri kongsbøndurnar og/ella vinnuna - tvørtur ímóti.

At ognartaka og/ella tvangsgjøgnumføra skipanir fyri privatu jørðina, tað e einki endamál, so leingi vit hava mjólkakvotur og, partvíst, liva av studningi í verandi landbúnaðarvinnu. Fyribils er tað nóg stórur biti, at fáa skil á almennu gørðunum – kongsjørðini. Ó ðalsjørðin krevur ikki almennan studning.

Ein nevnd arbeiðir við møguleikum fyri at menna búsetanina í útoyggjum. Vónandi kemur nevndin til ta niðurstøðu, at neyðugt er at fáa sett á stovn virksemi, ið kann geva fólki støðugt lønt arbeiðið – tað er høvuðstreytin fyri, at fólk støðast ídag – eingin kann halda hús uttan at hava lønt arbeiði árið runt.

Arbeiðið til allar vinnuførar, allastaðni í landi okkara. Tað er eitt mál, ið Javnaðarflokkurin vil virka fram ímóti.

Arbeiði til allar hendur, hevur altíð verið eitt aðalmál hjá tí Føroyska Javnaðarflokkinum, í tøttum samstarvi við fakfelagsrørsluna.

Veljið JAVNAÐARFLOKKIN!

# Hví skal alt ljós í landsuðri liggja???

**Niklái Petersen**
*valevni tjóðveldisfloksins í Norðurstreymi*



Nú løgmaður, Annfinn Kallsberg, hevur útskrivað nýval at verða týsdagin tann 30. apríl 2002, eru valevnini farin at brynja seg við øllum valvápnum, ið finnast.

Sitandi samgonga verður av andstøðuni skýrd fyri bæði líkt og ólíkt. Tað er ikki tað ting, ið sitandi samgonga ikki hevur gjørt galið, hóast allir føroyingar vita, hvussu nógv støðan er broytt til tað betra seinastu fýra árini.

Sjálvt um samgongan ikki altíð hevur verið samd, so er kortini nógv komið av skafti.

Rom varð ikki bygdur eftir einum degi, og soleiðis er eisini her, tað liggur nógv á láni.

Tjóðveldisflokkurin hevur umsitið fíggjarmál seinastu fýra árini, og skal Karstin Hansen, sum ovasti mynduleiki, hava stóra tøkk uppiborna fyri, at hava staði stinnur, hóast ágangurin hevur verið øgiligur. Slíkt krevur rygg.

Sitandi samgonga hevur fingið skil á fíggjarviðurskiftunum í tí føroyska samfelagnum, tað er lykilin fyri at fara víðari at loysa onnur mál.

Vit hava t.d. ongan tjóðarrokniskap havt fyrr enn nú. Her kann nevnast, at um eitt vanligt partafelag ikki letur rokniskap inn hvørt einasta ár í seinasta lagi í august mánaði, so verður partafelagi lýst á tvang.

Hjá afturhaldinum má og skal alt ljós í landsuðri liggja, hví tað er so, er ilt at vita, helst er tað sjúkan - politiskt letið - sum spøkir. Nei, vit mega loysa okkara viðurskiftir sjálvi eftir okkara egna leisti, tað krevur áræði og ábyrgd, og ikki politiskt letið.

Føroyingar gloyma ikki so skjótt. Hvør minnist ikki teir báðar sambandshøvdingarnir Edmund Joensen og Jóannes Eidisgaard, hvussu teir klandraðust, tá teir sótu í samgongu saman, hesin seinni gekk helst tá sum nú við einum løgmanni í búkinum, men kastaði burtur og samgongan teirra millum slitnaði.

Hvør minnist ikki páskahalguna fyri júst fýra árum síðani, tá oyrarbakkamaðurin sat fornermaður norðuri í sundalagnum og skrivaði út nýval mitt í einum valskeiði.

Hesir bjóða seg nú aftur fram at loysa øll viðurskifti í føroyska samfelagnum, hvør hevur álit á slíkum monnum???

Nú fýra ár seinni gongur javnaðarhøvdingin aftur fullur uppundir hendur, tað má hava verið ein tungur burður at gingið við hesi fýra árini, tiltikið er sum hjá fíli.

# Kreppan

**Joen Peter Petersen,**
*valevni Sanbansfloksins í Sandoyar valdømi*



Nú vilja vit altíð líta aftur um bak, tá ið vali stendur fyri durun, og fortelja hvør gjørdi skeivt og hvør hevði rætt. Men hyggja vit eftir kreppuni sum var fyrst í 90-unum, siggja vit hvussu viðkvæmt okkara einstátta lívsgrundalag er um vit ikki ansa eftir.

Hvar var "RÍKISFELAGSSKAPURIN" spyrja loysingarfólk, kanska í KOLTRI ella á DÍMUN, nei hann var, her men teir politsku mynduleikanir vóru for sløvir til at samskifta við ríkisstjørnuna.

Danskir politsku myndugleikar settu jú treytir fyri, at hjálpa tí sundursorlaða búskapinum sjálvandi, og hetta kom sum ein skelkur fyri føroyingar, men man kan siga at hetta var ein forsmakkur uppá eina búskaparkreppu í einum føroyskum fullveldi. Avleiðingar fyri okkara livilíkindi, persónliga frælsi og vælferð vóru ræðandi. Bankakervi og húsamarknaðurin rapa, ovurhonds stórt arbeiðsloysi og fólkaflyting, lønarniðurskurur, útbygging og viðlíkahald av okkara vælferðasamfelag verður stegða, o.s.fr. Á mongum økjum er enn ikki vunni innafturtað, sum vit mistu í kreppuni.

Men Sambandsflokkurin vil naka heilt anna fyri at henda kreppan ikki tekur seg uppaftur, sambandsflokkuri vil varveita ríkisfelagsskapin, og hava eitt tætt knýti við ríkisstjørnina, og harvið kunna endurnýggja heimastýrislógina í felag og ikki bara humpa avsta sum seinasta samgonga hevur gjørt, har ta hevur veri klandur í fýra ár og skilsmissan verur nú 30. apríl tíbetur.

Og við at líta frameftir skal sambansflokkurin ígongd við at fáa eitt enn betri vælfersamfelag, við at gera alt tað sum hevur ligi á láni tey seinastu 10-12 árini, og ta sum vit hava bundu okkum til at gera tey næstu komandi árini.

Tað ber val til hjá sitandi samgonguni at reypa um at vit eiga ognir uppá 2 milliardir, og at tær kunnu bera eitt fullveldi, og at vit kunna minka heildarveitingina í risalopum, ta kann skjótt vísa seg at vera ein stokkutur hiti. Vit eru bundin at so nógvum, at kiksar okkurt í búskapinum, merkir man tað onkra arðastaðni, tí avlop landskassans í landsbankanum, eru jú grunda av okkara útflutningsvinnu, hægstu heildarveiting nakrantíð, afturhildnar pensjónir, og lágar lønir gjøgnum nógv ár, førsømdar útbyggjingar, m.a. á eldraøkinum, heilsiøkinum. Tí kann einkomandi samgonga neyvan rokna við eins góðum útliti fyri okkara útflutningsvinnu, heildarveitingin er jú minka við 366. millónum krónum, pensjónir og lønir eru hækkaðar uppundir valið o.s.fr. so at verandi fíggjarlóg kemur at geva eitt hall, tá ið útlitini fyri aling og rækjuvinnu og luvíst botnfiski eru ivasom.

Ein komandi samgonga skal taka hædd fyri øllum hesum. Ta verður tí av stórum týdningi, at ansa væl eftir, og at neyðugar prioriteringar verða gjørdar, so at vit ikki enda í somu grøv, sum í seinru helvt av 80-inum.

Farið tí á val og velji ein tryggan Sambandsflokk inn løgting. Sambandsflokkurin vil ikki hava somu kreppu sum vit vóru í 90-unum.